# ÁRSFRÁSØGN
# 2011

RÁÐIÐ FYRI
FERÐSLUTRYGD

# FRÁGREIÐING FORMANSINS

**Árið 2011 varð merkt av stjóraskiftinum, sum fór fram 1. august, tá núverandi stjórin Brynhild Høgnadóttir tók við. Tað var seinast í mars, at Sølvi Reinert Hansen boðaði frá, at hann hevði tikið av aðrari avbjóðing, og tí segði starvið frá sær sum stjóri í RFF. Sølvi fór úr starvinum fyrst í apríl og røkti formaðurin starvið til nýggjur varð settur 1. august.**

Í hesum tiðarskeiði var skjøtil settur á nýggjan Hvølvus, sum var gamal og kanska ikki í nóg góðum standi til framhaldandi undirvísing. Arbeitt varð við møguleikanum fyri øðrum hølum, har møguleiki var fyri fakligari menning, har undirvísing og annað kundi fara fram ella í øðrum lagi at hava felagsskap við onnur, eitt nú Aktstovuna, Landsverk ella kommunu.

Nýggi faldarin 'Børn i bili' varð endurnýggjaður fyri at røkka so mongum sum gjørligt, herundir barnagørðum, vøggustovum, skúlum og barnafamilium. Í fleiri førum varð eisini givin undirvising frá RFF í samband við trygdarútgerðina í bilum og komið varð eisini inn á ásetingarnar um revsing við bót og klipp í koyrikortið.

Eitt tað fyrsta, sum farið varð undir, var at lýsa eftir nýggjum stjóra. Lýsingin varð snikkað til við góðari hjálp frá Eiler Fagraklett, nevndarlimi, og marknaðardeildini hjá TF. At starvið var hildið áhugavert bar stóri umsóknarskarin boð um. Ikki færri enn 34 umsøkjarar vóru til starvið, harav 6 vóru til persónliga samrøðu.

Í setanarbólkinum sótu: Kári Thorsteinsson, Armgarð Steinhólm og Eiler Fagraklett, sum stóðu fyri og innstillaðu fyri starvsnevndini, sum setti stjóran. Nevndin setti Brynhild Høgnadóttir í starvið við setan 1. august 2011. Brynhild er 6. stjórin í RFF.

**Síðani stovnan av RFF 19. januar 1976 hava hesi røkt stjórastarvið:**

1. Eli Nolsøe – 18.08.76 – 1978
2. Oskar Hermansen – nakar mánaðir í 1978
3. Olivur Næss – 1978 – 1992
4. Jón Kragesteen – 1993 – 2007
5. Sølvi Reinert Hansen – 2007 – 2011
6. Brynhild Høgnadóttir – 01.08.2011 –

**RFF hevur húsast í 6 ymiskum støðum:**

- KFUM
- Kopargøtu (Sápuhúsið)
- Yviri við Strond (bygn. hjá Svend Krosstein)
- Yviri við Strond (bygn. hjá Zacharias Bech)
- Skansabrekkuni (hjá Neystabø)
- Tungugøta 4 (hjá Neystabø)

> "Ráðið fyri Ferðslutrygd fer framhaldandi at virka eftir endamálsgreinini at gera ferðsluna tryggari við at betra um ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi."

Øll hesi ár hava vit havt nakrar brennandi sálir til frama fyri ferðslutrygdararbeiðið.
Umframt Petur Jacob Sigvardsen, heiðurslim okkara, sum hevur gjørt eitt fyrimyndarligt og gevandi arbeiði ferðslutrygdini at frama, so ein, sum altíð er har, men sum alt ov sjáldan verður nevndur, Kemm Poulsen, sum báðir helst koma í tíðini hjá Olivur Næss og hevur verið síðani – takk fyri Petur Jacob og Kemm.

Ráðið fyri Ferðslutrygd fer framhaldandi at virka eftir endamálsgreinini at gera ferðsluna tryggari við at betra um ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi.

RFF er framvegis umboðað í norðurlendska ferðslutrygdarráðnum NTR, har vit eisini eru ein virkin partur av ferðslutrygdararbeiðnum, í Landsferðslunevndini og kommunalu ferðslunevndini í Tórshavn.

Umframt eru vit partur av: Ferðslubólkinum, ið er ein fakligur bólkur, sum kemur saman minst 2 ferðir árliga og annars eftir tørvi at umrøða og viðgera ferðslumál í breiðum týdningi og virka fyri ásetingunum grundaðar á null-hugsjónina.

Bólkurin kann taka upp mál av sínum eintingum og kann viðgera mál, sum koma til bólkin frá landsstýrinum, løgtinginum, kommunum, myndugleikum, felagsskapum og øðrum og er samansettur av umboðum fyri hesar stovnar:

- **Innlendismálaráðið**, sum hevur ferðslu- og lógarmál sum málsøki
- **Akstovan**, sum hevur til endamáls at virka fyri størri trygd í ferðsluni
- **Landsverk**, sum skapar, umsitur og mennir samferðslukervið
- **Politiið**, sum virkar fyri friði, trygd, lóg og landaskili
- **Ráðið fyri Ferðslutrygd**, sum við upplýsing og átøkum virkar fyri størri trygd í ferðsluni
- **Kommunusamskipan Føroya**
- **Føroya Kommunufelag**

Ferðslubólkurin kann veita landstýrismanninum fakliga ráðgeving og meting í ferðslumálum, og koma við uppskoti ella tilmæli um tiltøk, sum kunnu útgreinast í kunngerðum, fyriskipanum ella lógarbroytingum og sum eru bygdar á null-hugsjónina og útgreinaðar í eini ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar.

**Kári Thorsteinsson**
*formaður*





# TEY MONGU ERU HYGGIN Í FERÐSLUNI

**Hetta er fjórða árið á rað, har ein ella tvey eru deyð í ferðsluni í Føroyum. Farna ár varð eitt lív mist í ferðsluni í Føroyum.**
**Tað er at fegnast um tey mongu sum eru hyggin í ferðsluni, tí soleiðis er við teim flestu. Tað er teimum fyri at takka, at vit síggja eina samlaða afturgongd í tali av deyðum.**

Kortini eiga vit ikki at gloyma tey, ið hava latið lív og teirra avvarðandi. Vit eiga eisini at vera varin við at halda, at alt stendur væl til. Vit skulu bert aftur til 2007, tá heili 7 fólk doyðu. Við tað at Føroyar eru eitt lítið land, er ikki óvanligt, at hagtølini sveiggja nakað. Hetta er triðja árið á rað við óvanliga nógvum kava, sum helst hevur havt við sær, at færri bilar hava verið á vegunum, sum í sær sjálvum kann avmarka talið av vanlukkum.

At tølini eru lutfalsliga lægri fjórða árið á rað, kann hava við sær, at tað gerst tyngri at fáa út boðskapinum um týdningin av arbeiðnum fyri ferðslutrygd, tí fólk fáa lyndi at halda, at her stendur væl til, og at jaliga gongdin heldur á av sær sjálvari. Tað eru fleiri stovnar, fyritøkur, politi, einstaklingar og onnur, ið arbeiða fyri øktari ferðslutrygd eftir sama langtíðar stavnhaldi sum Ráðið fyri Ferðslutrygd, nevniliga at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein í ferðsluni í Føroyum. Tess færri vanlukkur vit uppliva, tess størri er avbjóðingin at skapa minking.

## STÓR MINKING

Tó at ein doyði í ferðsluni í 2011, er rákið rætta vegin. Í 1986, tá ringast stóð til, doyðu 14 fólk. Tá vóru sløk 20.000 akfør í Føroyum. Í dag – 25 ár seinni – er talið av akførum umleið 29.900, tað vil siga ein munandi øking. Harumframt koyra vit nógv meira, samlaða ferðslan er nærum tvífaldað hesa tíðina. Samstundis er talið av deyðsvanlukkum týðiliga minkað.

**Fyri at røkka nullhugsjónini mælir Ráðið millum annað til hesar atgerðir:**

- Átøk og kunning um ferðslutrygga atferð
- Klipp i koyrikortið fyri ikki at brúka bilbelti – fyri vaksin
- Økt politieftirlit

Í EU-tinginum verður mælt til hámarksferð á 30 km/t í bústaðarbýlingum og bygdum økjum við ongum súkklubreytum, meðan norska Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til hetta ferðamark í øllum býum og tættbygdum økjum. Hetta fyri at verja fólk til gongu og á súkklum.

Hugburðurin til ferðslutrygd í dag er ein annar og betri, enn hann var fyri 25 árum síðani. Tað eru nógv fleiri, ið brúka bilbelti og bilstólar, eins og bilarnir eru tryggari og veganetið er vorðið tryggari, har ferðslan er mest. Samstundis hevur lækkaða promillumarkið fyri rúsdrekkakoyring gjørt sítt til ein ferðslutryggari hugburð á hesum øki.

## HJÁLMAR OG VESTAR

Fyri at síggja, hvussu skúlar og næmingar taka ímóti endurskinsvestum og hjálmum, sum árliga verða latnir næmingum úr ávíkavist 1. og 2. flokki, vitjaðu vit í Kvívíkar skúla og høvdu framløgu fyri næmingunum og lærarunum. Børnini tóktust stak væl nøgd við gávurnar og vitjanina. Lærarar frøddust eisini um vitjanina, og vístu á, at tað hevði nógv at siga, at lutirnir vóru leveraðir persónliga. Arbeitt verður tí við nýggjum





leisti, har eitt nakað verður gjørt burturúr, tá lutirnir verða latnir. Hjálmar verða latnir í samstarvið við Tryggingarfelagið Føroyar og Trygd, meðan endurskinsvestarnir verða latnir í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar.

## ENDURSKINSVESTAR Í JÓLASMÁTTU

Allan desember mánað hevði RFF eina smáttu við sølu av Guðrun & Guðrun-vestum í jólabýnum í Havn. Endurskinsvestarnir hava verið til sølu um alt landið, bæði í avgreiðslunum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og øðrum handlum kring landið. Lýst varð við søluni í stóru bløðunum. Tískil varð tað mett hóskandi at selja teir í Havn, nú goymslan var farin at minka, eins og vestarnir hava trý ár á baki. Sølan gav rættiliga fitt, og ráðið er nøgt við umrøðuna, ið sølan eisini hevði við sær.



## UNDIRVÍSING 8. FLOKKAR

Undirvísingin, sum Jón Kragesteen hevur havt ábyrgdina av seinastu árini hevur fingið sera góð skotsmál frá næmingunum øll árini, sum til hvørt átak hava eftirmett um virksemið. Samstundis eru Føroyar einasta norðurland, sum røkkur øllum árganginum umframt Tekniska skúla í Havn. Til samanberingar kemur Sikker Trafik við sínum átaki út til 1/3 av Danmarkar framhaldsdeildum.
Ferðsludagarnir verða skipaðir í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar og Trygd.

## 'GLÓÐ', 'FERÐSLUDRÁP'

Bólkurin 'glóð' er sera væl umtóktur millum tey ungu, og sangurin hevur verið heilt nógv spældur í útvarpi óg á youtube.com. Í RFF hildu vit sangin og tilhoyrandi filmin vera sum gjørdan til ferðsludagarnar, og tí settu vit okkum í samband við 'glóð', fyri at fáa eina samrøðu við bólkalimirnar, sum høvdu skrivað sangin. Teir gjørdu ein film, sum nú verður spældur eftir at næmingarnir hava sæð og hoyrt lagið. Her svara teir millum annað, hvat teir vilja siga føroyingum við sanginum. Hetta hevur riggað framúr væl. Tey ungu hava verið hugtikin av hesum.

**Í DESEMBER 2011 KOM NÝGGI ROKKBÓLKURIN, 'GLÓÐ', ÚT VIÐ LAGI, IÐ NEVNIST 'FERÐSLUDRÁP'.**

## Ferðsludráp

við glóð

Ja, baby, ger so væl og stíg,
min bil inn í.
Ja, her er alt so megafeitt.
Mobilt diskotek.
Eg traðki hart hart hart
til tann helvidis fart
Adrenalinið floymir runt í mær
Veit familja tín, hvat væntar tær?
Skjótt hon tey bláu ljósini sær.

Hoyr meg Føroyar,
í kvøld eri eg Guð!
Tá vit hava málað býin reyðan,
geri eg meg upp;
við lívum eg kasti lut,
og taki so børn tíni.

100 yvir loyvdu ferð
Sig mær hvar er
markið millum ósketni og tilvitað dráp?
Eg koyri skjótt skjótt skjótt,
tí at tíðin er røtt.
Vit skulu flúgva saman í nátt,
tí tú skalt smakka kalt hav.
Eg smíli, tá eg koyri útav.

Hoyr meg Føroyar,
í kvøld eri eg Guð!
Tá vit hava málað býin reyðan,
geri eg meg upp;
við lívum eg kasti lut,
og taki so børn tíni
við mær í deyðan.

112 fólk eru í neyð,
men har er eingin vón nú.



## AVVARÐANDI SIGA SÍNA SØGU

Sum nakað nýtt hava vit fingið avvarðandi inn í ferðsludagarnar. Vit hava fingið eitt lítið toymi á tríggjar kvinnur, sum siga sína søgu um at missa ein, sum tey eru góð við í ferðsluvanlukku.

Hetta varð eisini gjørt, eftirsum Jákup Thomasen, sum hevur sitið í koyristóli eftir ferðsluvanlukku, hevur víst á, at hann vildi avlastast í hesi uppgávu, sum hann nú hevur havt í eini 15 ár. Tað vísir seg at rigga stak væl við teimum avvarðandi. At síggja eina systir umrøða dýra missin av sínum beiggja, mammuna um sín 20 ára gamla son og dóttrina, sum misti bæði síni foreldur, tykist at ávirka tey ungu nógv.

## HVØLVUS OG GØLLUR

Eftir at nýggur Hvølvus varð fingin til vega í 2011, varð greitt, at bæði Hvølvus og Gøllur bert eru ætlaðir fólki sum eru fylt 15 ár. Teir eru framleiddir í Noregi, har Norsk Vegvesen eigur hesar simulatorar, og hevur 15 ára aldursmark. Eyðsæð er, at hetta mark má haldast.

Hetta kom tó illa við í mun til at simulatorarnir báðir bert verða brúktir í ferðsludøgunum, har 8. floksnæmingar og næmingar av Tekniska skúla luttaka. Teir hava riggað sera væl inn í skránna. 8. floksnæmingar eru 14 ár, og byrja at fylla 15 í seinna helmingi av 8. floks skúlaárinum. Av hesi orsøk verða Hvølvus og Gøllur nú bert brúkt til undirvísingina av Tekniska skúla. Roynt hevur verið at flyta ferðsludagarnar úr 8. upp í 9. flokk, men tær spurdu skúlaleiðslurnar eru ikki sinnaðar til hetta, við tað at hesir næmingar eru sera upptiknir av terminsroyndum og øðrum, tá hetta er seinasta kravda skúlaárið.

Ráðið arbeiðir við at finna aðrar møguleikar fyri gagnnýtslu av simulatorunum báðum.

## G&G-ENDURSKINSVESTAR LATNIR Í FERÐSLUDØGUM

Tað, ið eftir er á goymslu av endurskinsvestum verður latið 8. floksnæmingum til gávus. Vestarnir vóru júst ætlaðir ungum fólki, sum ofta eru ring at fáa at brúka endurskin. Tey ungu hava tikið væl ímóti teimum.

## REGLULIGA Í MORGUNSENDINGINI

Síðani í desember mánaði hevur RFF luttikið í morgunsendingini hjá útvarpinum annanhvønn hósmorgun saman við ferðslupolitinum. Varhugin er, at rættiliga mong lurta eftir morgunsendingini, bæði á arbeiðsplássum og í bili, so hetta verður hildið at vera eitt gott stað at koma út við boðskapinum um tryggar vanar í ferðsluni. Ráðið velur út evni at umrøða.

## NORÐURLENDSKT SAMSTARV

Ráðið er partur av samstarvi við hini ferðslutrygdarráðini í norðurlondum, har vit hittast hálvárliga at umrøða gongdina og at læra av hvør øðrum.

Til fundin á heysti í 2011 í Gotlandi var yvirskipaða evnið 'tey gloymdu børnini'. Felags avbjóðingin í hinum norðurlondunum er, at skipað undirvísing er fyri yngru børnunum, meðan tey størru børnini yvir 12 ár mangla skipaða undirvísing um trygga atferð í ferðsluni.





“

Tað er at fegnast um tey mongu sum eru hyggin í ferðsluni, tí soleiðis er við teim flestu. Tað er teimum fyri at takka, at vit síggja eina samlaða afturgongd í tali av deyðum

”

# NULLHUGSJÓN & FERÐSLUTRYGDARÆTLAN

## SKADD OG DEYÐ Í FERÐSLUNI 2000-2011

Talið av skrásettum ferðsluvanlukkum hevur verið fallandi seinastu árini. Í Ársfrágreiðing 2011 hjá Landsverki vísa niðanfyristandandi talvur, at talið á skrásettum ferðsluóhappum hjá politinum alsamt eru minkandi.

Mynd 1 vísir talið av óhappum við fólkaskaða, býtt á landsvegir og kommunalar vegir. Í ferðslutrygdarætlanini frá 2007 var ítøkiligt mál sett, fyri at fáa talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða í 2015 at verða 30% minni enn í 2006. Hetta málið er langt síðani rokkið. Talið á ferðsluóhappum við fólkaskaða í 2011 av heili 67% minni enn í 2006. Sum myndin eisini vísir, eru sveiggini stór frá ári til árs, men tað er greitt, at talið er minkandi.

**Mynd 1: Ferðsluóhapp við fólkaskaða**




**Mynd 2: Skadd og deyð í ferðsluni**




Eisini talið á skaddum og deyðum í ferðsluni er minkandi, sí mynd. Tølini er tó aftur her smá og sveiggini stór frá ári til árs.

## FERÐSLUTRYGDARÆTLANIN 2008-2015

Á fundinum í Ferðslubólkinum 11. apríl 2012 var semja um, at ferðslutrygdarætlanin 2008-2015 skal verða endurskoðað, tá flestu tiltøkini antin vóru rokkin, eru ávegis og kanska okkurt við tíðini varð vorðið óneðugt.

Umrøtt varð um leistin seinast, har RFF var toghaldari á uppgávuni, og at hetta helst eisini var ein leistur til eina dagførda ætlan. Tað er tó umráðandi, at landsstýrismaurin, sum umsitur málsøkið, eisini setir sítt fingramerki á ætlanina og formliga setur hana í gongd. Tað varð hildið realistiskt at arbeiða fram ímóti fyrru helvt av 2013, og at vit til komandi fund í september 2012 viðgera hetta.

**Status fyri tilmæli í ferðslutrygdarætlanini**

* : nakað av ávirkan | ** : miðal ávirkan | *** : stór ávirkan

**Reytt:** Ikki byrjað | **Gult:** Ávegis | **Grønt:** Gjøgnumført

1. 🟢 Promillumarkið lækkast **
2. 🟢 Nullmark fyri onnur rúsandi evni **
3. 🟢 Øll í trygdarbelti ***
4. 🟢 Sektarhækking ***
5. 🔴 Koyri- og hvílitíðarreglur *
6. 🟢 Løgreglueftirlit ***
7. 🟡 Sjálvvirkandi ferðkanningar ***
8. 🟢 Próvalkometur **
9. 🟡 Inndráttur av prutli **
10. 🟡 Hámarksferðin lagast til vegakervið **
11. 🟢 Ferðslutryggja vegamót ***
12. 🟡 Skilja bleyta ferðslu frá teirr hørðu ***
13. 🟡 Seyður burtur av vegnum ***
14. 🟢 Dagføra tunnlar *
15. 🟡 Landsvegir uttan um bygt øki ***
16. 🟡 Møguleikar fyri tryggari yvirháling ***
17. 🟢 Rumlistrípur ***/**
18. 🟢 Ferðslutrygdargranskoðan ***
19. 🔴 Talgilt vegakort **
20. 🔴 Beltiáminnari ***
21. 🟢 Stuðla trygdartiltøkum **
22. 🟡 Átøk ***
23. 🟢 Greiðari kunning um reglur fyri útskriving av heilivági **
24. 🟢 Ferðgáar v.m. ***
25. 🔴 Venjingarbreyt **
26. 🟡 Ferslufrálæra í dagstovunum og skúlum **
27. 🟡 Økt nýtsla av súkkluhjálmi *
28. 🟡 Íbundin børn ***
29. 🔴 Koyrikortið til prutl **
30. 🔴 Koyrikortið til bil **
31. 🔴 Kollektiva ferðslan **
32. 🟡 Kommunalar ferðslutrygdarætlanir ***
33. 🟡 Hagtøl ***
34. 🔴 Skaðakanning ***
35. 🟡 Ferðsltrydararbeiðið framyvir **



## VIRKSEMI OG ÁTØK FYRI FRAMMAN

Starvsnevndin hevur sett út í kortið, at RFF skal fremja hesi mál í verki:

**Høg raðfesting**

- ***Framleiðsla av undirvísingartilfari***

Sum er finst einki dagført undirvísingartilfar, tó at ásett er í § 8 í fólkaskúlalógini, at undirvísast skal í ferðslu. Tó finst ein mappa við tilfari at kopiera. Tað tykist greitt, at tað er lítil skipað ferðsluundirvísing í fólkaskúlanum, eins og uppfylgingin helst ikki verður raðfest. Inntøkurnar av Guðrun og Guðrun-vestum fara óskerdar til arbeiðið fyri ferðslutrygd fyri børn, sum var ynskið hjá Guðrun og Guðrun.
RFF hevur gjørt av at uppfylla hetta mál við at framleiða undirvísingartilfar. Tískil er ætlanin til heystar 2012 at fara undir framleiðslu av undirvísingartilfari.

***Fólkaskúlalógin §8. Upp í undirvísingina í fólkaskúlanum koma í hóskandi lærugreinum og á hóskandi aldursstigum hesi kravdu undirvísingarevnini:***

1. Kvæðamentan
2. Ferðsla
3. Útbúgvingar- og vinnulívskunning
4. Heilsukunnleiki og seksualupplýsing

- ***Gera nýggja heimasíðu***

Heimasíðan hevur fyri neyðini at verða dagførd, soleiðis at upplýsingar um ferðslutrygd altíð eru tøkar hjá føroyingum. Til hetta krevst fyrst og fremst, at orka verður sett av til at framleiða hetta tilfar, men eisini at skipan til heimasíðu og design verða fingin til vega. Sum er hevur RFF ikki fígging tøka til hetta endamál, men arbeiði fyri at finna eina loysn

- ***Ferðslutrygg fyritøka***

Ráðið hevur arbeitt við einum leisti, sum tó ikki er settur í verk. Endamálið er at starvsfólk í fyritøkum fáa tilmæli frá síni leiðslu um ferðsupolitikk, herundir hvørji krøv fyritøkan setir um ferðslutrygd í arbeiðstíð, men eisini góð ráð. Ætlandi skal RFF stuðla undir verksetanina av ferðslutryggari fyritøku.

- ***Samstarvsavtalur við fleiri fyritøkur um fígging av átøkum***

Við verandi fíggjarkarmi er eingin orka til ferslutrygdarátøk, tó at hetta er týðandi partur av viðtøkum ráðsins. Tí áliggur tað ráðnum at finna aðrar inntøkur at gera hetta møguligt.

## MIÐAL RAÐFESTING

Uppfylging av ferðslutrygdarætlanum fyri kommunur.
Eggjan til ferðslutrygdarpolitikkum á skúlum og stovnum.

## ÁTØK FYRI 2012

| | |
|---|---|
| Januar/februar: | Gáloysni (Tryggingarfelagið Føroyar) |
| Mai: | Ferð (Trygd) |
| Juli: | Minningardagur teirra deyðu |
| August: | Hjálmar/Vestar (Tryggingarfelagið Føroyar og Trygd) |
| November: | Rúsdrekkakoyring (fyritøka manglar) |

**RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD**

TUNGUGØTA 4 · POSTSMOGA 3209 · 110 TÓRSHAVN · TEL. 310204 · TELDUPOSTUR: RFF@RFF.FO · WWW.RFF.FO